

# Samkomublaðið fyri mai

# 2015

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Okkara avgerðir mynda lívið

*Vinjard Johansen*

Í Jeremias kap 1, vers 5 stendur skrivað: "Áðrenn Eg myndaði teg í móðurlívi, kendi Eg teg, og áðrenn tú komst út úr móðurfangi, halgaði Eg teg". Vit eru øll skapt eftir Guds mynd, og Gud hevur eina ætlan við einum og hvørjum av okkum.
Sum børn vóru vit uppald av foreldrunum, ið tóku avgerðir fyri okkum, men nú, tá vit eru vorðin vaksin, taka vit sjálv avgerðir. Vit velja sjálvi innihaldið í okkara lívi. Vit eiga at leggja okkum í geyma, at ein og hvør avgerð er við til at mynda okkara dag, okkara lív, og enntá lívið hjá okkara næsta.
Nógv eru valini, men tað størsta og týdningarmiklasta í lívinum, er valið til ævinleikan. Fyri at fáa lut í ævinleikanum hava vit bert ein møguleika í at velja - at velja at trúgva á Guð, skapara himins og jarðar, og geva okkara lív til hann. Hetta er ein einkul avgerð, men vísir seg tó ofta at vera sera torfør at taka.
Vit er øll ymisk, og Guð hevur eina ætlan við einum og hvørjum av okkum, men í dagligdegnum er tað ikki altíð so lætt at velja tað, ið leiðir okkum tann vegin, Guð vil. Tíðirnar í dag eru fongdar við nógvum tíðartjóvum, ið vilja forma okkara dagligdag fyri okkum, um vit ikki gáa eftir tí. Nógv av tí, sum vit hoyra og síggja, leiðir okkum enntá til mótloysi, troyttleika, líkasælu og ger okkum egoistisk. Tí er tað týdningarmikið, at vit eru vakin og seta okkum fyri at dagliga taka tey val, tær avgerðir, ið samsvara við Guðs ætlan við okkum.
Lat okkum leggja hetta í geyma, at læra at velja rætt, og liva nær Harranum hvønn dag. Nærri ein livir saman við Harranum, léttari er at velja Hansara vegir. Ein kemur at kenna tann, ið ein brúkar tíð saman við, tí er tað týdningarmikið at brúka tíð saman við Jesusi og hvønn dag biðja um vísdóm at velja rætt.
Í Sálmi 25,12 stendur: Hvør er tann ið óttast HARRANUM? Honum vísir hann vegin, ið hann skal velja.
Í Filip. 1,22 stendur: Men um tað at liva í holdinum gevur mær ávøkst av verki mínum, so veit eg ikki, hvat eg skal velja.
Í Mark. 12,24 stendur: Jesus svaraði teimum: "Er tað ikki tí, tit villast - tí tit kenna ikki skriftirnar, ei heldur mátt Guds!
Í 2 Tim. 3,16 Stendur: Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi.
Tí fari eg at áminna meg sjálvan og tykkum um at brúka tíð at lesa Guds orð og biðja. Hetta vil hjálpa mær og tykkum at taka tey røttu valini, sum koma at føra okkum inn í Guðs ætlan fyri okkara lív.

# Skrá fyri mai

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 4. mai | kl. 20.00 | Bønarmøti |
| Týsdagur | 5. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 6. mai | kl. 20.00: | Dópsmøti (í barnasalinum). Pauli Høj talar |
| Leygardagur | 9. mai | kl. 21.00: | AWAKE við Lívsins Orð |
| Sunnudagur | 10. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við Anniku Høj<br>Sangframførsla við Jens Súna Hansen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 11. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 12. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 13. mai | kl. 19.30: | Møti við Leif og Susanne Madsen<br>(New Life Mission) |
| Leygardagur | 16. mai | kl. 21.00: | AWAKE við Súsonnu Olsen |
| Sunnudagur | 17. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við Helga og Oddbjørg Abrahamsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 18. mai | kl. 19.00: | Reach Out á Selatrað<br>(bussur fer úr Kelduni kl. 18.30) |
| Týsdagur | 19. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 20. mai | kl. 19.30: | Undirvísing við Ólavi Jacobsen.<br>Evni: At kenna Gud (1. partur) |
| Fríggjadagur | 22. mai | kl. 19.30: | Samkomulegan byrjar |
| Leygardagur | 23. mai | kl. 21.00: | Einki AWAKE vegna samkomulegu |
| Sunnudagur | 24. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku<br>(samkomulega)<br>Sangframførsla við Ara og Per Langgaard |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 25. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 26. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 30. mai | kl. 21.00: | AWAKE við Jóhan Petur Johannesen |
| Sunnudagur | 31. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti Ólavi Jacobsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 1. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 2. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 3. juni | kl. 19.30: | Undirvísing við Ólavi Jacobsen.<br>Evni: At kenna Gud (2. partur) |
| Leygardagur | 6. juni | kl. 21.00: | AWAKE við ymiskari luttøku |
| Sunnudagur | 7. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj.<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

# Lýsingar

## Samkomulega

Í døgunum 22.-24. mai verður samkomulega í Kelduni. Endamálið er at styrkja samanhaldið, fáa andaliga føði og hugna okkum saman.
Ætlanin er at hava nógvar spennandi aktivitetir bæði inni og úti.
Møguleiki verður at gista. Legukostnaður er 200 kr. fyri vaskin (13 ár +) og 100 kr. fyri børn (3-12 ár), tó mest 600 kr. fyri hvørja barnafamilju.
Leggið til merkis, at legan er fyri ALLA samkomuna – so um tú ert barn, ungur, miðaldrandi ella gamal, so gleða vit okkum at síggja teg til leguna
So ger skjótt av og tekna seg á keldan.fo ella á tlf. 738388.

## Undirvísing mikukvøld

Sum vit áður hava kunngjørt, fara vit nú í mai mánaði undir eina miðvísa og málrættaða undirvísing, ið verður annaðhvørt mikukvøld í lítla salinum í Kelduni.
Endamálið við hesi undirvísing er at gera fólk búgvin og tilreiðar til at tæna Jesusi.
Nógv spennandi evni verða á skránni, bæði innan andaliga menning og vøkstur, bíbliukunnleika og um náðigávur og tænastu. Aftaná hvørja undirvísing, verður eisini høvi at seta spurningar og at samtala um evnið sum verður tikið fram. Vit ynskja at skapa eitt lærisveinaumhvørvi, har fólk í øllum aldri kunnu mennast og vaksa inn í Guds fullkomnu ætlan við teimum.
Minst til – Gud hevur eina ætlan við tínum lívi! Vit ynskja at hjálpa tær, so tú kanst liva tað lívið, sum Gud ætlaði tær.

## Tulkingartænasta á AWAKE

Tørvur er á fleiri at koma uppí, so vit kunna bera eldin saman og tæna teimum, sum hava brúk fyri at fáa evangeliið
Áhugað kunna venda sær til Tórhild Biskopstø (tlf. 260684).

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584